Suðuroyingar og vágafólk eru fullkomiliga slept upp á fjall:

Nú eru fleiri hundrað arbeiðspláss í vanda

– Nú er tað stórur vandi fyri, at eini 400 arbeiðspláss í Vágum, og serliga í Suðuroynni fara fyri skeytið.
– Vit føla okkum fullkomiliga slept uppá fjall, tí vit hava fleiri ferðir gjørt vart við vandan, men ongin letst um vón, sigur Bogi Mortensen, reiðari og vinnulívsmaður

ÁKI BERTHOLDSEN


– Hendir onki, er tað ein er tað ein veruligir og ítøkiligur vandi fyri, at eini 400 arbeiðspláss serliga í Suðuroynni, men eisini í Vágum fara fyri skeytið.

– Samstundis er vandi fyri, at vit missa fleiri av teimum góðu skipunum av landinum

Talan er um øll tey fólkini, og øll tey húskini, sum vinna sítt dagliga breyð á teimum 12 djúpvatnstrolarunum.

Og talan er um øll tey fólkini, sum vinna sítt dagliga breyð við at arbeiða á teimum flakavirkjum, har hesi skip avreiða.

Bogi Mortensen í Vági, reiðari á nøkrum av djúpvatnstrolarunum, og vinnulívsmaður sigur, at tey kenna seg fullkomiliga slept uppá fjall síðani djúpvatnstrolararnir mistu íløgustuðulin í mars mánaða í ár.



– Verður íløgustuðulin ikki settur í gildi aftur í eini trý-fýra ár, fara tey flestu skipini av landinum. Tað fer at føra eitt ovurhonds arbeiðsloysi og stóra fráflyting við sær. Og tá fáa politikararnir ein nógv størri trupulleika at dragast við enn at játta 14 milliónir í íløgustuðuli um árið. 14 milliónir um árið í eini trý-fýra ár, er tað, sum skal til fyri at bjarga 400 arbeiðsplássum, sigur Bogi Mortensen, reiðari og vinnulívsmaður í Vági

– Vit hava fleiri ferðir gjørt vart við trupulleikan, men tað er ongin sum ønir okkum svar aftur.

– Tað tykist ikki, sum øll tey fólkini, sum liva av hesum, eiga nakran góðan.

– Men er meiningin at djúpvatnstrolararnir skulu avsigast, hevði tað verið ærligari at sagt sum var, heldur enn at latið sum einki og seigpínt skipini úr flotanum, leggur hann afturat.

Klára seg ikki

Bogi Mortensen sigur at hann kennir roknskapirnar hjá summum av djúpvatnstrolarunum, men at støðan er áleið tann sama hjá øllum.

– Og tað er onki at taka seg aftur í, at var íløgustuðulin ikki, hava teir hall í hundraðtúsund klassanum.

– Hetta hallið fer bara at hópa seg upp. Og so er tað, at okkurt má gerast.

Reiðarin og vinnulívsmaðurin í Vági sigur, at vandin fyri, at trolararnir fara á heysin er veruligur og ítøkiligur.

–Partafeløgini hava skyldu til at halda kreditorar, partaeigarar og innskjótarar skaðaleysar.

– Tí slepst ikki undan, at tann dagur er kanska ikki so fjarur, at tað má umhugsast at selja djúpvatnstrolararnar.

– Og tað verður ongin trupulleiki.

– Men tað verður ongin í Føroyum, sum keypir teir.

– Verða teir seldir, fara teir av landinum, og tað verður heldur ongin trupulleiki tí har er prísurin fyri teir hægri enn restskuldin er, sigur Bogi Mortensen.

Støðan er versnað

Hann sigur, at tað alla tíðina hevur verið greitt, at djúpvatnstrolararnir fóru at fáa tað trupult, um landsstýrið gjørdi álvar av at ætlanini at taka íløgustuðulin burtur.

– Men í ár er støðan versnað uppaftur meiri, tí nú fáa vit heldur onki burturav svartkalvanum tí garnabátarir hava at kalla stikað Føroyagrunnin inni við gørnum.

Bogi Mortensen vísir eisini á, at tað, sum hevur bjargað botnfiskaflotanum undir Føroyum seinastu árini er tann góði fiskiskapurin eftir toski og hýsu, men tað fáa djúpvatnstrolararnir onki burturav.

– Og nú íløgustuðulin eisini er tikin, er støðan versnað so nógv, at tað verður ómetaliga trupult, fyri ikki at siga ómøguligt.

– Hinvegin hava vit ført fram, at fáa teir íløgustuðul í eini trý - fýra ár afturat, er restskuldin komin so langt niður, at teir klára seg uttan stuðul.

Stórt arbeiðsloysi

Bogi Mortensen sigur, at verður djúpvatnsflotin avsagdur fer tað at føra ovurhonds stórt arbeiðsloysi við sær, tí tað eru eini 400 fólk sum hava sína dagligu úrtøku burturúr tí, sum hesi skipini fiskað.

Harðast rakt verða suðuroyingar, har teir flestu djúpvatnstrolararnir avreiða, men eisini í Vágum verður standurin ringur

Bogi Mortensen sigur, at djúpvatnstrolararnir kastað nógvar ferðir meiri av sær til samfelagið enn tað, teir fáa í íløgustuðuli.

– Stuðulin er ein góð millión um árið til hvørt skipið

Ivist í um tað hjálpir

Bogi Mortensen ivast í, um tað hjálpir uppá støðuna, at ætlanin er at geva djúpvatnstrolarunum eina hjáveiðikvotu, sum kann keypast og seljast, ístaðin fyri tað hjá veiðiprosentið, sum teir hava nú.

– Tað veldst um, antin talan verður um eina kvotum eftirspurningur verður eftir. Fáa vit t.d. eina kvotu í Barentshavinum, kann hon ikki handlast. Tí har er ongin toskur, og tí verður heldur ongin eftirspurningur eftir kvotuni, sigur hann. **(Sí eisini greinina niðanfyri)**

Fáa einar 70 milliónir í løn

Virðini, sum djúpvatnstrolararnir skapa í samfelagnum, eru nógvar ferðir størri enn stuðulin, tey fáa

ÁKI BERTHOLDSEN

– Tað hevur ómetaliga stóran týdning, at djúpvatnstrolararnir verða verandi í flotanum (sí greinina omanfyri). Tí teir skapa nógv størri virði fyri samfelagið, enn tær 14 milliónirnar, teir fáa í stuðuli.

Bogi Mortensen reiðari, sigur, at fyri at geva eina ábending um, hvussu stóran týdning teir 12 lemmatrolararnir hava, kann nevnast, at teir fiska eini 13.000 tons um árið.

– At kalla alt verður avreitt og virkað í Føroyum, og tað er næstan bara í Vágum og Suðuroy at teir avreiða.

Hetta gevur eitt avreiðingarvirði uppá einar 120 milliónir.

Av hesum verða goldin eini 40% í hýrum og beinleiðis lønum. Hetta eru einar 40 milliónir. Av teimum verða einar 15-20 milliónir goldnar í statti.

– Siga vit, at miðalúrtøkan er 40%, svarar hetta til 5.200 av lidnari vøru, sum hevur eitt útflutningsvirði uppá einar 150 milliónir.

– Raksturin av skipunum skapar eisini ein innfluting.

– Skipini brúka fyri einar 20 millionir í olju, 10 milliónir í reiðskapi og 4 milliónir í provianti. Uppi í hesum tølum er vinningur til tey, sum selja og lønir til tey, sum arbeiða. Runt roknað gevur hetta virksemið eina lønarútgjalding uppá 10-11 milliónir. Men afturat tí koma trygging, havnagjøld, grannskoðing o.s.fr.

Tey 13.000 tonsini, sum verða avreitt í Føroyum, skapa eina beinleiðis løn á fiskavirkjunum uppá einar 20 milliónir. Hetta gevur ein skatt uppá umleið. 7 milliónir.

Sostatt skapa hesi skipini eitt lønarútgjald uppá 70 milliónir og burtuarav tí, fáa land og kommunur einar í 25-30 milliónir í skatti.

15 fólk eru knýtt at hvørjum skipi. Talan er sotatt um 180 arbeiðspláss á sjónum og inntøka til 180 heim. Á landi er talan um minst líka nógv arbeiðspláss.

Sostatt eru tað eini 400 arbeiðspláss, sum standa og fella við íløgustuðulinum.

Og so skal leggjast afturat, at teir fiska bara fiskasløg, sum annars *ikki* verða fiskað og koma til høldar.

– Øll hesi arbeiðspláss og øll hesi virði kunnu bjargast, um landið letur 14 milliónir í íløgustuðuli í 3-5 ár afturat, tí so klára skipini seg sjálvi, sigur Bogi Mortensen.

Gjáargarður
við Gjógv til sølu



Gjáargarður er higartil rikin sum eitt gistingarhús við seingjarplássum til uml. 100 gestir.

Byggiár: 1984.
Prísur: kr. 2,8 mill.
Útgjald: kr. 300.000.
Brutto: kr. 19.700.

Lánið í ognini er treytað av, at BRF kann góðkenna keyparan.

Áhugað biðjast venda sær til:

Trúgva Sivertsen
Tlf. 053 628110

Dimmalætting TR 31 1212